VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fyrrapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í storm og regn. Hitin kemur upp í eini 7 stig.



Veðrið leygardagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men onkur sólglotti. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.



Veðrið sunnudagin:
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og + 3 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin andøvsgul av suðri, týsdagin hækkar hann upp í útnyrðing. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 6 stig.

Bókaútgáva í Leikalund

Í sambandi við at nýggja danska skaldsøgan »Færøblues« kemur út, verður skipað fyri móttøku í Leikalund í Klaksvík í morgin

BÓK
Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Talan er um næstu skaldsøgu hjá danska rithøvundanum, Lisbeth Nebelong, ið hevur búð í Føroyum sum barn og ung, eins og hon eisini oftani hevur vitjað aftur síðani. Fyrsta verk hennara var nógv umtalaða »Når engle spiller Mozart«, sum kom út í 2003.

Ætlanin er at geva út tríggjar bøkur, sum allar viðgera samanrenningina av danskari og føroyskari mentan í Norðuratlantiska samfelagnum. Hendan bókin Færøblues er um Kára, ið sum 19 ára gamal flytur úr Føroyum og ikki vitjar aftur heima á klettunum fyrr enn 25 ár seinni, tá hann skal luttaka í eini konsert í Norðurlandahúsinum sum cellospælari. Nú hevur hann konu og børn og kemur hetta at verða ein tíð, har hann millum annað kemur til uppgerðar við bæði barndómin og mammu sína.

Lisbeth Nebelong fer at lesa upp úr bókini, eins og hon eisini fer at greiða neyvari frá um bókina. Sjálv heldur hon eisini, at tað hevði verið spennandi við einum kjaki út frá teimum evnum, ið verða viðgjørd í skaldsøgum hennara. Høvi verður at keypa bæði hesa bókina og fyrru útgávu hennara, sum hon í tí sambandi fer at signera.

Úr Leikalund verður sagt, at øll eru vælkomin á móttøkuna fríggjadagin klokkan 16.00



Skaldsøgan hjá Lisbeth Nebelong snýr seg um 19 ára gamla Kára, ið flytir úr Føroyum og ikki vitjar aftur heima á klettunum fyrr enn 25 ár seinni

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-4
Nuuk	--
Qaqortoq	-3
Ammassalik	-2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	--
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	6
Lerwick	7
Aberdeen	7
London	8
Tromsø	--
Bergen	1
Oslo	--
Stokkhólm	2
Keypmannah.	5
Helsinki	3
Moskva	-4
Berlin	2
Warzawa	0
Kiev	0
Bukarest	5
Paris	10
Madrid	12
Róm	14
Malorca	21
Athen	12
Malta	17
Tunis	20
Beijing	9
New Dehli	23
Bangkok	30
Jakarta	32
Sydney	--
New York	8
Miami	25
Los Angeles	14
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1025 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landsynning. Eitt lágtrýst, 998 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist.



Í dag:
Djúpa lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og gevur eitt skifti storm á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 20/11 kl. 06⁰⁰ – 21/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,0°
Minsti hiti máldur í november: -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰ – 19/11. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 63 mm

Tiltøk í Miðlahúsinum

22. november
7b í Hoyvík á hundasleðu í Grønlandi

26. november kl. 19
Kvinnuhúsið

28. november
Landsbankin

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

VESTFALLSKYRRINDI

17. november Fyrra kvarter
24. november Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
22. Nov.	03.54	16.18	02.54	15.18	03.09	15.33	05.54	18.18	06.54	19.18	02.09	14.33	01.09	13.33	04.09	16.33	05.09	17.33	03.39	16.03	04.54	17.18
23. Nov.	04.43	17.10	03.43	16.10	03.58	16.25	06.43	19.10	07.43	20.10	02.58	15.25	01.58	14.25	04.58	17.25	05.58	18.25	04.28	16.55	05.43	18.10
24. Nov.	05.37	18.05	04.37	17.05	04.52	17.20	07.37	20.05	08.37	21.05	03.52	16.20	02.52	15.20	05.52	18.20	06.52	19.20	05.22	17.50	06.37	19.05
25. Nov.	06.34	19.06	05.34	18.06	05.49	18.21	08.34	21.06	09.34	22.06	04.49	17.21	03.49	16.21	06.49	19.21	07.49	20.21	06.19	18.51	07.34	20.06
26. Nov.	07.38	20.09	06.38	19.09	06.53	19.24	09.38	22.09	10.38	23.09	05.53	18.24	04.53	17.24	07.53	20.24	08.53	21.24	07.23	19.54	08.38	21.09

Lesið Sosialin -tað loysir seg